VIT SKULU TOSA UM TAÐ!

Samrøðan, sum skal fyribyrgja lógarbrotum

VIT SKULU TOSA UM TAÐ
Upprunaheitið „*Vi skal tale om det*“,
Umsett úr donskum 2009 við loyvi frá:
Det Kriminalpræventive Råd
Odinsvej 19, 2.sal
2600 Glostrup

Riststjórn:
Steen Hansen
Sandra Vinding
DKR.nr.: 02-601-0110
ISBN 87-88789-52-7

Givið út føroyska tilfarið:
SSP- samstarvið
Barnaverndarstova Føroya
R.C. Effersøesgøta 30
100 Tórshavn

Lagt til rættis:
Óli Rubeksen

Avritan loyvd við kelduávísing

VIT SKULU TOSA UM TAÐ!

Samrøðan, sum skal fyribyrgja lógarbrotum



INNIHALD

Fororð 5
Tann neyðuga, men torføra samrøðan 6
Hví skalt tú gera vart við teg? 6
Nær skalt tú gera vart við teg? 6
Tá dirvið svíkur. 8
Fyrireiking til samrøðuna 10
Hvør er trupulleikin? 10
Endamálið við samrøðuni? 11
Verklig fyrireiking 13
Sálarlig fyrireiking. 13
At fáa samband í lag 16
Dømi um bræv til foreldrini 17
Samrøðan 18
Gongdin í samrøðuni 18
Samskiftið 20
Virkisætlanin 22
Samrøðan endar og afturmelding. 22
Endi og afturboðan 22
Formligar reglur 23
Samskiftið um upplýsingar 23
Fráboðan. 23
Tagnarskylda 24

Skjal: Eftirkanningarlisti. 26

FORORÐ

Ein góð samrøða kann verða tann stóra broytingin hjá einum barni ella ungum, sum er í vanda fyri at gerast lógbrótari. Fleiri av samarbeiðspørtunum hjá Kriminalfyribyrgjandi Ráðnum hava gjørt vart við, at tað kann vera sera torført at taka stig til eina samrøðu við børn og ung, sum eru í vandabólkinum fyri at gerast lógbrótarar, og foreldur teirra. Trupulleikarnir kunnu m.a. vera óvissan um tulking av málum um tagnarskyldu og ábendingar/tekin frá tí unga í vandabólkinum, stúran fyri, hvussu atburðurin hjá familjuni verður ella tvørrandi verulig vitan um, hvussu ein samrøða eigur at fara fram. Persónliga dirvið og fakliga vitanin hjá teimum einstøku starvsfólkunum spælir eisini ein stóran leiklut í hesum sambandi.

Ætlanin hjá Kriminalfyribyrgjandi Ráðnum er at geva fakligum starvsfólki, sum standa á odda í slíkum arbeiði, sum t.d. heilsufrøðingum, pedagogum, lærarum, løgreglufólki og starvsfólki innan sosiala økið, nøkur amboð, sum kunnu gera tað lættari at koma ígjøgnum ta fyrstu fyriskipaðu og ofta torføru samrøðuna við børn, ung og foreldur teirra. Verða børnini, tey ungu og foreldrini stuðlað nóg tíðliga, gerst vandin nógv minni fyri, at tann ungi endar sína lívsleið sum lógbrótari.

Í bóklinginum eru stuttar, hentar vegleiðingar um, hví og nær starvsfólkini, sum standa á odda, skulu gera vart við seg, tá ið børn og ung eru á vandaleið – og hvussu ein samrøða kann fyrireikast og fremjast.

Aftast í bóklinginum er ein eftirkanningarlisti, sum kann takast úr og liggja frammi á skriviborðinum ella takast við í lumman.

TANN NEYÐUGA, MEN TORFØRA SAMRØÐAN



Hví skalt tú gera vart við teg?

Tað er umráðandi, at "onkur" varskógvar, tá børn og ung eru á veg út í óføri. Tað ger einki, um tú er tann, sum tekur hetta stigið. Hóast tað er pínufult fyri bæði foreldrini og barnið ella tann unga at síggja avleiðingar av lógarbroti í eyguni, er tað betri at bera skjótt at, heldur enn ikki lata við seg koma, tá tekin vísa seg. Uppgávan kann gerast eitt sindur torfør, tá tú samstundis ikki ert vís/vísur í, hvussu stóran týdning tínar eygleiðingar hava. Tað, sum tú tekur stig til, kann tó gerast avgerandi fyri, um tann, sum er í vanda fyri at vera á veg í óføri, verður ein, sum "hini" ikki mugu spæla við, ella um barnið ella tann ungi kann koma á eina mennandi og rætta kós. Møguleiki er eisini fyri at koma barninum, tí unga og familjuni nærri og varnast, um tað er nakað at vera stúrin fyri. Undir onkrum umstøðum hevur tú aftur at tí medmenniskjansligu ábyrgdini eisini moralska, etiska ella formliga ábyrgd. Talan kann t.d. verða um fráboðanarskyldu.



Nær skalt tú gera vart við teg?

Fyrstu ferð, tú staðfestir ein grundaðan illgruna um, at barnið ella tann ungi er í vanda fyri at koma í óføri og kann fáa eitt keðiligt kriminelt atferðarmynstur, skalt tú gera vart við teg. Tú skalt taka alt tað, tú sært, hoyrir og merkir í álvara og brúka tína fakligu vitan og royndir og politikkin á arbeiðsplássinum til at gera av, um tú skalt taka stig til eina samrøðu. Tað eru fleiri atburðarbroytingar, sum kunnu benda á, at tíðin er búgvin til at taka stigið til eina samrøðu, hóast tú kanska ivast í, hvussu neyðugt tað er.



Tú hevur møguliga upplivað, at barnið ella tann ungi/unga

- fær eina materiella ovurnýtslu
- gongur oftari úti
- ikki heldur avtalur
- skulkar
- gevst við frítíðarítrivi
- er ofta at síggja saman við ótangunum á staðnum
- velur samveruna við tey vaksnu frá
- kemur saman við brotsmonnum og rúsevnisnýtarum
- happar ella verður happaður
- gerst meira rastleysur, snarsintur ella innilokaður
- fellur í fátt og gerst ótroystandi
- rennur seg í somu stríðsstøður upp í saman aftur uttan at læra av tí

Yvirlitið er ikki endaligt, og ei heldur staðfesta nevndu dømini, at nakað nýtist vera galið.

Aðrar ábendingar kunnu vera atburðarbroytingar í umhvørvinum:

- barnið ella tann ungi er ikki longur væl sæddur í felagsskapinum
- skilagóð vinfólk halda seg burtur frá barninum ella tí unga
- onnur foreldur óttast fyri, hvat barnið ella tann ungi kann lokka teirra egna barn til

Minst til, at nøkur ung eru offur fyri fordómum og kunnu verða sett uttanfyri, uttan at tey sjálv hava ávirkan á ta negativu umtaluna. Tá tú tekur allar upplýsingarnar og eygleiðingarnar sum heild og skalt taka saman um, er tað týdningarmikið, at tú at enda nýtir tín fakliga kunnleika til at greina, hvussu álvarslig støðan er, og um ein samrøða skuldi verið neyðug.

Tá dirvið svíkur til at fáa eina samrøðu í lag

- hvussu fært tú tað so aftur?

Samrøður við børn og ung, sum eru í vanda fyri at gerast lógbrótarar, og teirra familjur eru sera torførar at fremja. Eisini hjá teimum professionellu starvsfólkunum við drúgvum og týðandi royndum kann tað av ymiskum orsøkum vera sera torført at taka seg saman til at fremja slíkar samrøður.

Tað er eitt vanliga kent fyribrigdi, at fakfólkini hveppa seg við tær torføru samrøðurnar. Órógv kemur á tey, tey verða óttafull, ivasom, ótrygg og vilja helst sleppa undan at fremja samrøðuna. Er samrøðan nú neyðug, og er tað veruliga eg, ið skal taka stig til samrøðuna?

Frágreiðingarnar í sambandi við mótstøðuna kunnu vera fleiri og ymiskar. Kanska kennir tú barnið, tann unga ella foreldrini í øðrum samanhangi, har tað hevur víst seg, at tey ikki eru løtt at samstarva við. Kanska skulu tit tosa um evnir, sum bæði eru viðkvæm, og sum fara yvir um mørk. Tú veitst, at tú sjálv hevði verið ill, ótrygg, stúrin og møguliga skorið í grát, um tú sum foreldur skuldi havt eina slíka samrøðu.

Tað er eisini soleiðis, at vit øll í ávísum samrøðustøðum flyta okkum á ókenda grund, sum vit ongantíð kenna úrslitið av, og tá kunnu vit eisini missa fótafestið eina stund. Einki løgið er í at vera óttafullur og stúrin, eins og tað er heilt náttúrligt, at familjan er kensluliga ávirkað.

Ger tær greitt, at tú kanst gera okkurt skeivt. Óttin fyri at gera eitt mistak eigur ikki at halda teg aftur í at taka stig til samrøðuna. Øll fólk gera mistøk viðhvørt, og um tú gerst varugur við tað ávegis í samrøðuni, so kann tað sum oftast rættast uppaftur.
Tað mest umráðandi er at minnast til, at júst tú kanst gera ein mun við at fremja samrøðuna. Hesar samrøður eru sum áður nevnt neyðugar, tí tær kunnu vera við til at forða eini gongd, sum fyrr ella seinni kann føra til eina kriminella lívsleið. Tí er bæði samrøðan og tín serkunnleiki á økinum júst tað, familjuni tørvar.

Ein væl fyrireikað samrøða, eitt trygt og gott tvørfakligt samstarv, hjálpsemi og virðing fyri familjuni og teirra kenslum elva til, at barnið og familjan kunnu fáa eina góða fatan av samrøðuni.



SAMRØÐAN VERÐUR FYRIREIKAÐ

Tað hevur stóran týdning fyri samrøðuna, at greiða er fingin á ymiskum viðurskiftum, áðrenn tú tekur stig til at bjóða familjuni til eina samrøðu.

Hvør er trupulleikin?

Fyrst mást tú gera tær greitt, hvørjum tú og møguliga tínir starvsfelagar í tí tvørfakliga samstarvinum stúra fyri, og hvussu álvarsligur trupulleikin er. Tú eigur at greina trupulleikarnar á ymiskum fakligum og persónligum stigum, so tú fært orðað vandamálini fyri ávikavist barninum, tí unga, familjuni og starvsfeløgunum.

Tað fyrsta og avgerandi stigið at taka, tá ið tú sum fakfólk hevur grundaðan ótta, er at lýsa trupulleikin stutt og greitt.

Tað besta er at orða trupulleikan í einum setningi, sum foreldrini skilja, og í einum setningi, sum tínir starvsfelagir skilja.

Ein slík miðvís og føst skipan fær teg at síggja, hvussu neyðug og týdningarmikil samrøðan er, og tú verður eisini meira tilvitaður og vísur í, hvat tú vilt náa.

Foreldrini skulu kunnast um eygleiðingarnar og orðingina av trupulleikanum.
At seta orð á ótta og meting eru amboð, tú kanst nýta sum støði undir samrøðuni.

So hvørt sum samrøðuni líður, koma fleiri upplýsingar á borðið, sum annaðvørt økir ella minkar um tín ótta, og síðan ber til at meta um støðuna av nýggjum.

Áðrenn tú fert undir samrøðuna, hugsa so um, hvørja ávirkan hon kann hava, um avleiðingar og møgulig tiltøk. Hesar umhugsanir kunnu á sama hátt sum greiningin av trupulleikanum verða lagdar fram á tvinnanda hátt. Lutvíst so foreldrini skilja, og lutvíst so starvsfelagar skilja.

(Orð verða sett á trupulleikan, og niðurstøðan kann setast upp í trimum stigum)

Kanningar Ítøkilig tvørfaklig eygleiðing	Trupulleikin verður greinaður út frá ítøkiligum sannroyndum, sum t.d. kanningum, eygleiðingum og dagbókauppritum, sum tey avvarðandi fakfólkini hava gjørt. Við at lýsa trupulleikan í einum setningi fært tú kjarnutrupulleikan best fram í ljósið. ***Lýs trupulleikan í einum setningi, so foreldrini skilja tað.***
Stúran Lýst í mun til siðsemi/virðir, sum koma til sjóndar í umhvørvinum. T.d. eitt lógarbrot	Óttin, tú hevur við støði í tínari fakligu vitan og teimum virðum, sum bæði tú og tín stovnur standa fyri, verður gjørdur ítøkiligur. ***Lýs henda óttan – og møguligar avleiðingar.***
Meting Eygleiðing og stúran verða orðaðar og síðani umsettar til óítøkiligar umhugsanir.	Faklig meting av trupulleikanum, greiningar og umhugsanir. Hesar umhugsanir kunnu og eiga at vera við í einari møguligari fráboðan. ***Orða trupulleikan í einum setningi, so tínir starvsfelagar skilja tað.***

Endamálið við samrøðuni

Fyrsta samrøðan hevur í minsta lagi trý endamál:

- at fáa greiði á, hvussu tit hvør í sínum lagi fata trupulleikan
- at vísa á møguligar avleiðingar – har ímillum, at aðrir myndugleikar og stovnar verða drignir við inn í málið
- at fáa greiði á, hvussu tilgondin skal vera frameftir



Hesi viðurskifti eiga at verða umhugsað og orðað frammanundan:

- hvat vilt tú náa við hesi samrøðu?
- hvussu vilt tú hava samrøðuna at vera?
- (t.d. vegleiðandi, stuðlandi, trupulleikavend ella „bart út“)
- hvørjar resursur hevur barnið ella tann ungi? Sæð við tínum eygum?
- hvørjar resursur hevur barnið ella tann ungi? Sæð við familjunnar eygum? (Verður avdúkað meira í samrøðuni.)
- hvørjar vónir hevur tú til barnið ella tann unga?
- hvørjar vónir og dreymar heldur tú, at foreldrini hava til barnið ella tann unga?
- samsvara tykkara vónir við metingina av tilfeinginum?
- hvønn týdning heldur tú, at trupulleikin hevur fyri barnið, tann unga og familjuna?
- hvørjar stutt- og langtíðar avleiðingar kann tað fáa, um trupulleikin ikki verður loystur?
- hvussu skalt tú tryggja tær, at familjan skilur, hvat tú sigur?



Verklig fyrireiking

Tú hevur ábyrgdina av, at huglagið er gott og fjálgt, meðan samrøðan fer fram. Tí er neyðugt at hugsa um, hvørji hølir eru tey røttu, og um kaffi ella vatn skal vera á borðinum. Í onkrum føri kanst tú eisini velja at vitja familjuna – tað metir tú um. Undir øllum umstøðum er tað týdningarmikið, at samrøðan verdur framd í friðarligum umhvørvi, so tit kunnu tosa í frið og náðum.

Set 30 til 60 minuttir av til eina samrøðu. Ansa eisini eftir, at tú ikki hevur skund beint aftan á samrøðuna, um brúk skuldi verið fyri meiri tíð til at greina okkurt gjøllari.

Tað tvørfakliga

Minst til, at tú skjótt kann gerast partur í einum tvørfakligum samstarvi, har tit í felag lyfta uppgávuna við tykkara ymisku fakligu førleikum og royndum. Ver greiður yvir tín leiklut og tína ábyrgd sum ein part av loysnini á ítøkiligu trupulleikunum. Tað hevur stóran týdning at gera sær greitt, at tað tvørfakliga samstarvið ongantíð má verða soleiðis, at talan verður um mótstríðandi viðurskifti millum familjuna og teg – „tey og vit“.

Í fyrireikingartíðini mást tú hugsa um, at bert teir neyðugu fakpersónarnir verða til staðar, tá samrøðan skal vera við familjuna. Tað kann verða neyðugt, at tann fakbólkurin frammanundan sættast um fakmørk og sínámillum førleikar. Hvør hevur hvørja uppgávu og hví?

Sálarlig fyrireiking

Tú eigur eisini frammanundan at hugsa um, hvussu tín stúran og upplýsingarnar í málinum ávirka teg. Hetta eigur tú eisini at tosa við tínar starvsfelagar um frammnaundan. Tað eru fleiri siðalagsligar og menniskjansligar áskoðanir í samband við torførar samrøður, sum nema við okkum øll. Sum fakfólk merkir tú kanska, at tú hevur samábyrgd, um onnur koma væl ella verri fyri. Hesin óttin kann ávirka teg, men júst tí er tað týdningarmikið at hava eina tílíka samrøðu. Tak óttan um barnið ella tann unga í álvara.

Hvussu fyrireikar tú teg til samrøðuna?

Tá tú hevur gjørt tær greitt, hvat tú ætlar tær at siga, ræður um at duga at bera tað fram og nærkast sjónarmiðunum hjá tí, sum tú hevur samrøðu við. Eins

og tú fyrireikar teg til, hvat samrøðan skal vera um, kanst tú eisini fyrireika teg til, hvussu samrøðan kann gerast so góð sum gjørligt.

Ver til reiðar at møta samrøðufelaganum við opnum sinni, við forvitni og viðurkenning.

Opinleiki

Meðan tú fyrireikar teg til samrøðuna, ímyndar tú tær, tilvitað ella ótilvitað, hvussu tað menniskja er, sum tú skalt hitta. Tað góða við undanfatan er, at hon er góð at miða seg eftir, tá vit skulu hitta onnur fólk. Høvdu vit onga fatan frammanundan, høvdu vit ikki vitað, hvat vit skuldu lagt merki til í slíkum støðum.

Fatanin, sum vit hava frammanundan, kann eisini lumpa okkum, tí vit kunnu koma at blanda hana við ta veruligu støðuna, sum vit skulu royna at finna fram til. Spurningurin er sostatt:

Hvussu kanst tú vera væl fyrireikaður til samrøðuna og samstundis møta tínum samrøðufelaga við opnum sinni?

- Ger tær greitt, hvørjar hugsanir tú hevur um tín samrøðufelaga og hansara ella hennara veruleika.
- Viðurkenn tínar hugsanir sum neyðug vegleiðing til samrøðuna.
- Ásanna tínar hugsanir sum fyribils og ófullfíggjaðar, kanska enntá skeivar, myndir av veruleikanum.

Forvitni

So hevur tú ruddað slóðina til at vera forvitin um persónin, sum tú skalt hitta, og samrøðuna, tit skulu hava. Hvat er tað at vera forvitin?

Skilt verður ímillum at sneyta og so at verða áhugaður og royna at fáa sum mest burtur úr nýggjum upplýsingum í samrøðuni.

Sunt forvitni er treytað av, at tú ert tilvitaður um tínar undanfatanir, og fert á rannsókn inn í heimin hjá tínum samrøðufelaga.

Viðurkenning

Viðurkenning er at kennast við sjónarmiðini hjá hinum, hansara sjálvsfatan og veruleikafatan, og at góðtaka hetta sum hansara stremban eftir at skapa meining.

Hetta er treytað av, at tú lærir veruleikan hjá samrøðufelagnum at kenna, og síðani viðurkennir hann sum hansara ella hennara fatan. Hvat nú, um tann veruleikin er heilt øðrvísi enn tín? Kunnu og skulu vit viðurkenna fatanir, sum vit ikki eru samd í? Ja, tí tað er ikki tað sama sum at góðtaka tað.

Tær nýtist ikki at verða samdur, tíansheldur er neyðugt at góðtaka fatanina hjá hinum fyri at viðurkenna hana. Viðurkenning er, at tú skilir sjónarmiðini hjá tínum samrøðufelaga, og at tú skilir ímillum hansara og tíni sjónarmið.

Við slíkari viðurkenning og slíkum hugburði leggur tú upp til eina samrøðu, har sum ymiskar ella mótstríðandi áskoðanir ikki endaliga fara at kappast um sannleikan, men geva tykkum møguleikan at fáa betri innlit í hugaheimin og fatanina hvør hjá øðrum.

Í onkrum førum er tað endamálið við samrøðuni. Í øðrum førum er ætlanin við samrøðuni at broyta óhóskandi atburðir. Í øllum førum er samrøðan millum ymiskar veruleikafatanir ein treyt fyri at skilja sjónarmiðini hjá hvørjum øðrum.

Valdsbýti

Í slíkum samrøðum, sum vit umrøða her, er oftast tilvitað ella ótilvitað ójavnt valdsbýti. Tú umboðar „skipanina“, sum hevur ymiskar lógarheimildir. Familjan sær teg sum ein myndugleika, sum kann boða sosialu myndugleikunum frá.

Familjan umboðar heimaumhvørvið, og skal akta boðini og halda lógina í skipanini. Tað er tí týdningarmikið, at tú ert tilvitaður um hetta valdsbýtið, tí tað er familjan. Tín ótti og atburður, tín lýsing av trupulleikanum sum heild og tíni evni at lurta og skilja eru við til at taka broddin av ójavnvágini í valdsbýtinum. Hesi viðurskifti kunnu eisini vera við til at skapa eitt álit millum partarnar, sum tryggjar eina betri loysn, tí trupulleikarnir verða loystir í felagsskapi og góðum huglagi.

AT FÁA SAMBAND Í LAG

Hugsa teg um og legg til rættis, hvussu tú ætlar at bjóða til samrøðuna. Tað er sera týdningarmikið fyri hugburðin mótvegis tær, at barnið, tann ungi og øll familjan verða kunnað á ein slíkan hátt, at tey skilja, hvussu týdningarmikið tað er, at tey møta upp. Tað er vert at gera sær greitt, at trupulleikin skal loysast í einum samstarvi, sum øll familjan er týdningarmikil partur av.

Innbjóðingin kann t.d. vera ein telefonsamrøða at byrja við, men týdningarmikið er, at ein skrivlig innbjóðing eisini verður send. (Niðanfyri er eitt dømi um ein brævtekst).



Vertsskapur

Tú ert vertur við samrøðuna og hevur tí ábyrgdina av einari væleydnaðari samveru. Vertsskapurin merkir, at tú fortelur eitt sindur um, hvør tú ert og týðiliga lýsir tín leiklut og ætlanina við samrøðuni. Familjan eigur at kenna seg sum gest, um samrøðan ikki er í teirra heimi. Í hesum sambandi hevur tað eisini nógv at týða, at øll fáa møguleika at fortelja um seg sjálvi.

Um tú skrivar niður undir samrøðuni, eigur tú at siga teimum tað og greiða teimum frá orsøkini.



Dømi um eitt bræv til foreldrini

Tummas og Tina Hansen
Spógvagøta 65
FO 979 Øruvík

Góðu Tummas og Tina
Eg skrivi til tykkara, tí eg í eina tíð havi lagt til merkis, at Tórður er nógv broyttur. Hann er meira rastleysur enn hann plagar, og er byrjaður at arga hinar næmingarnar, og tað sær út til, at hann ikki longur er við í vinafelagsskapinum, sum hann plagdi. Hann virkar heldur ikki serliga glaður.

Eg haldi, at tað er nakað, sum bendir á, at hann hevur tað meira enn vanliga trupult at vera ungur.

Eg havi roynt at tosað við Tórð um hetta, men hann roynir sum frægast at sleppa sær undan at svara.

Tað kann vera, at tað bara er í skúlanum, at broytingarnar eru hendar, men tað kann vera, at tit eisini hava lagt til merkis onkrar broytingar?

Tí haldi eg, at tað hevði verið gott, um tit, Tórður og eg hittust og tosaðu um viðurskiftini.

Eg mæli til, at vit hava ein fund mánadagin 16. mai kl. 14.00 á skrivstovuni í skúlanum.

Um tað ikki liggur fyri hjá tykkum at koma ásettu tíð ella á nevnda staði, so eru tit vælkomin at ringja til mín og avtala okkurt annað.

Vinaliga
Sigvald, flokslærari

SAMRØÐAN

Gongdin í samrøðuni

Tú hevur avtalað, nær og hvar tit skulu hittast, hvussu longi samrøðan skal vara, og gestirnir hava fingið innbjóðing. Gongdin í samrøðuni skal vera soleiðis:

1. **Byrjunarumfar:** Samband. Hvørji eru vit? Hvør er orsøkin til fundin? Hvussu leingi varar fundurin?
2. **Avmarkingar av trupulleikunum:** Semja. Hvat skulu vit tosa um?
3. **Arbeiðsumfar:** Meting og greining.
4. **Endaumfar:** Samskipa fatanir og tilrættislegging. Hvat skal henda? Hvat manglar? Nær og hvør skal fylgja málinum upp?
5. **Eftirmeting:** Hvussu hevur fundurin verið? Siga farvæl og takka fyri fundin.

Avmarka trupulleikan

Tá tú og familjan møguliga hava ymiskar fatanir av trupulleikanum, skulu tit í felag greina ella avmarka trupulleikan. Sostatt fær familjan sama møguleika at lýsa trupulleikan, sum tú hevur havt. Í byrjanini á samrøðuni koma fleiri týdningarmiklar upplýsingar fram. Tað, sum liggur fremst á tunguni, verður eisini sagt sum tað fyrsta. Hugsa um orðini, og hvat tey merkja. Viðmerk tó bara tað, sum er sagt. Sit undir hvørjum orði og ansa eftir, at tú hevur fatað tað, sum er sagt, á sama hátt sum familjan sær tað.

Gev tær góða tíð og nýt tín fakkunnleika og hugskygni til at skilja, hvussu familjan fatar trupulleikan, og hvat tey hugsa um tað, sum kemur fram. Gev til kennar, at tú hevur skilt, við at endurtaka tað, tey hava sagt.

Lítur tú yvirskipað, í eini heild, at trupulleikanum, gerst hann á mangan hátt sjónligari, meira ítøkiligur so at siga. Alt hetta, sum tú hevur fingið at vita um støðuna og søguna aftanfyri, eru týðandi upplýsingar fyri familjuna, og eru við til at avmarka samanhangir, sum trupulleikin hevur tikið seg upp í. Onkrir av hesum samanhangum vísa seg at vera heilt øðrvísi, enn tú sum fakfólk hevði umhugsað, tá ið tú fyrireikaði samrøðuna. Tað, sum hevur størsta týdningin er, at tit í felag koma til eina niðurstøðu. Tú skalt framhaldandi verða til taks fyri at skilja teir samanhangir, har trupulleikarnir hjá barninum og familjuni kunnu stinga seg upp. Tað kann t.d. vísa seg,kriminalitetur er eitt eyðkenni ella ein máti at hjá barninum ella tí unga at biðja um hjálp. Atburðurin kann eisini vera eitt tekin um, at familjan ikki maktar støðuna og manglar amboð til at handfara hana, og at tey hava brúk fyri góðum ráðum og vegleiðing.

Tú skalt minnast til at halda fast í tínum, samstundis sum tú roynir at skilja heildina. Harafturat skalt tú hugsa um, hvussu tín boðskapur og sjónarmiðini hjá barninum og familjuni koma hagartil, at tit partvíst hava somu áskoðan á avleiðingarnar longri og styttri fram í tíðina, og partvís eru samd um, hvør tað er, sum hevur ábyrgdina av, at trupulleikin verður loystur. Tað kann t.d. hugsast, at foreldrini ikki hava sama óttan, sum tú hevur, ella at tey í familjuni hava ymiska fatan av støðuni, hvussu álvarslig ella trupul hon er. Hetta greiningarumfarið skalt tú ikki fara so lættliga um, hóast tað kann gerast drúgt. Partarnir fáa møguleikan at lurta eftir hvørjum øðrum og umhugsa støðuna. Tað er í lagi, at tú hevur viðmerkingar til tað, sum verður sagt, men tú mást ansa eftir, at tú ikki roynir at sannføra, virkar dømandi, kemur við góðum ráðum ella byrjar eitt størri kjak.



Tú kanst vísa eitt menniskjansligt andlit í tí professionellu samrøðuni, um tú t.d. sigur: „Eg hugsi, at tað má vera torført, tá løgreglan ringir til tykkara, og tit ikki onki vita um, hvat ið er hent“.

SAMSKIFTI

Mál

Títt kropsmál speglar bæði tínar tilætlaðu og ótilætlaðu kenslur og støður. Tín hugsan vísir seg í tínum orðavali, sum sigur frá, um tú virðir og góðkennir tey, tú samskiftir við. Tað vísir seg eisini í tínum samskiftismáta, andadrátti, eygnasambandi, hondum, ørmum og beinum, í tínum verumáta yvirhøvur.

Fakmál skapar fjarstøðu. Foreldur, børn og ung føla seg í „forhoyr“ og tað forðar fyri, at samrøðan gerst jalig. Tí skal tú forklára orðini so einfalt sum møguligt, hvørja ferð tú ert í iva um, hvussu móttakarin fatar tað, tú ber fram.

Dømir um, hvussu ymist vit fata orð: „Kanska uppfatar sonur tín tann nýggja mannin hjá tær sum eina hóttan?“. „Nei. Hann hevur ongantíð hótt hann !“

Ofta er so stórur munur á orðavalinum hjá ungum og eldri, at neyðugt er at týða millum ættarliðini. Skemtingarsemi ber boð um, at tú kanst vísa teg menniskjansligan, men ger ikki ov nógv av yvir fyri fólki, ið ikki hava yvirskot, ella sum hava eitt annað slag av skemtingarsemi ella onnur virðir, enn tú sjálvur hevur.

Lurta og spyr við áhuga og sál

Ger tær ómak við at lurta, lurta teg fram til ta fullu meiningina – til allan boðskapin í tí, sum sagt er. Tú skalt gáa eftir bæði innihaldinum og kenslunum í tí, sum sagt verður. Set fram greiðar spurningar, ið finna meiningina aftan fyri orðini, men lat vera við at fortelja um tíni egnu hugarensl. Persónurin kennir á sær, at hann er nóg góður og lurtar tí betur eftir sær sjálvum, ger royndir við sínum egnu tonkum og hugsar um broytingar. Í hesi gongd broytir tú uppfatanina av persóninum, tú talar við, og tann mótstøða, sum kann vera, fjarar burtur. Minst til, at tað skal vera hvíld og friður í samrøðuni og tíð til at grunda og hugsa.

Verjumekanisman

Í øllum samskifti er týdningarmikið, at tú kennir tíni egnu mørk og tey hjá hinum. Ein og hvør, sum ger vart við síni sjónarmið og sínar kenslur, hevur sínar natúrliga verjumekanismur. Tær kunnu vera avnoktanir, burturtroðkingar, mótálop, mótstøða ímóti broytingum.

Mekanismurnar eru amboð í stríðnum fyri teimum grundleggjandi rættindum, vit hava sum menniskju, men tað kann vera, at tú upplivir tær sum eitt álop á teg, tí tú sum alment umboð umboðar trupulleika, ið roynt verður at loysa.

Mótstøðan ímóti at síggja perspektivini í eini samrøðu kann t.d. vísa seg sum vreiði. Tað krevur sosialt hegni og innlit bæði hjá sendara og móttakara at vera í eini beinleiðis og ábyrgdarfullum samskifti.

Tað eru nógv fleiri verjumekanismur. Onkrar av hesum kanst tú merkja í tær sjálvum, tá ið tú skalt fara undir okkurt trupult, meðan aðrar eru ótilvitaðar. Ein óhóskandi verja kann beinast burtur á tann hátt, at tú undir samrøðuni skapar ein dám av tryggleika, áliti og nærlagni at skilja og loysa trupulleikan.

Spurningar, ið kunnu spyrjast

- tað er gott at nýta hv – spurningar, tí teir leggja upp til opnar spurningar (hav í huga, at orðið „hví“ mangan er orsøkin til drúgvar frágreiðingar. Nýt heldur stuttar og beinraknar spurningar, sum byrja við hvar, hvat, hvør, nær, hvussu o.s.fr.)
- útdýpandi spurningar skapa kensluna av at verða hoyrdur og skiltur:
  „sig fra einari støðu, har alt gekk ikki til vildar“, ella „Hvussu hugsar tú um onnur menniskju í einari líknandi støðu ?“
- minst til vandnar spurningar og staðfestingar:
  „Eg upplivi tað sum, at tú gjørdist ógvuliga uppøstur,…Var tað ikki so ?“ ella „Tað má vera trupult at hava hasa vitanina“
- spyr til samanhangin ella munin:
  „Í nevndu støðum ert tú glaður …nær ert tú so illur ?“
- tak aftur í aftur tað, sum sagt verður, fyri at tryggja tær, at tú hevur skilt tað, og tak saman um:
  „tú sigur við øðrum orðum…“

VIRKISÆTLAN

Tá ið tú at enda ert før fyri at gera felags orðingina, skalt tú at fáa hana at sampakka við familjuna. Tit hava nú eitt felags útgangsstøði fyri at halda fram, og tit kunna í felag royna at finna veruligar loysnir. Hesar loysnir verða samanfataðar í eini virkisætlan.

Eitt týdningarmikið stig í hesi ætlan er ein avtala um, nær hvør ger hvat. Virkisætlanin er ein felags pallur at fara víðari frá – ein veruligur samarbeiðsmøguleiki – har tað vísir seg, at tey í familjuni longu hava gjørt sær sínar tankar. Tað er vinningurin við at vera í tilgongdini.



ENDI OG AFTURBOÐAN

Tá ið ein samrøða við eitt barn ella eitt ungt fólk er liðug, er altíð tørvur á at eftirmeta og umhugsa støðuna og helst fáa afturboðan frá einum starvsfelaga. Tað er gagnligt at fara ígjøgnum umførini í samrøðuni bæði viðvíkjandi tilgongd og innihald. Hvat eydnaðist og hvat eydnaðist ikki? Gjørdi nakar nakað mistak? Hvussu verða mistøkini rættað?

Á henda hátt ert tú betur fyri at halda fram í arbeiðnum við tí ítøkiliga vandastadda, og tú gerst betur førur fyri at fara undir eina nýggja samrøðu.

Aftast í bóklinginum er ein samanfatandi lýsing av innihaldinum og gongdini í tí profesionellu samrøðuni.

FORMLIGAR REGLUR

Samskifti um upplýsingar

- við atliti at tí lógarbrotsfyribyrgjandi samstarvinum millum skúla, sosialar myndugleikar og politiið.

Sambært rættargangslógini § 115 eru møguleikar fyri, at myndugleikar, sum taka lut í einum lógarbrotsfyribyrgjandi samstarvi, kunnu geva persónsupplýsingar víðari til onnur. Tó krevst, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri samarbeiðið, men upplýsingarnar kunnu gevast víðari uttan samtykki frá tí, sum upplýsingarnar snúgva seg um.

Hóast avgerðina í rættargangslógini § 115 b eiga myndugleikarnir í høvuðsheitum at tryggja, at foreldrini og tann ungi samtykkja, at tær neyðugu upplýsingarnar um familjuna verða givnar.

Fráboðan

Tað eigur bæði tíðliga í tilgongdini og undir arbeiðinum at verða umhugsað, um trupulleikarnir hjá barninum er av einum slíkum slagi, at tað er skylda at boða frá (melda).



Fráboðanarskyldan sambært lóg um barnavernd er sambært § 14:

„Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi kunnu fáa kunnleika til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí hesu lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.“

Gloym ikki at boða frá, tá ið tú ert stúrin um barnið. Fata fráboðanina sum eina hjálp og ikki sum eina klagu.

Ivast tú í, um tú skalt melda ella ikki melda, kanst tú seta teg í samband við barnaverndartænastuna á staðnum, og innihaldið í málinum kann umrøðast í trúnaði.

Tagnarskyldu

Tað er sum meginregla alment innlit í fyrisitingina. Undantikin er tagnarskyldan, sum er áløgd alment settum og øðrum. Tað merkir, at upplýsingar um privatu viðurskiftini hjá persóni og aðrar trúnaðarligar upplýsingar sum høvuðsregla ikki mugu latast til óviðkomandi.
Men í fráboðanarmálum skalt tú lata tær upplýsingar víðari, ið snúgva seg um trivnaðin hjá børnunum, og sum er ein fyritreyt fyri, at barnaverndartænastan kann viðgera málið.

Góður skikkur í samband við fráboðan

- virð foreldrini. Líkamikið, hvussu umstøðurnar í eini familju eru, so er og verður familjan tað týdningarmesta hjá barninum. Virð tað, at foreldrini kunna hava aðrar normar
- foreldrini verða tikin við frá byrjan. Foreldrini verða upplýst um fráboðanina.
- foreldrini eiga ikki at fáa at vita um fráboðanina beint upp undir eitt vikuskifti. Foreldrini skulu ikki ganga við upplýsingunum uttan sum skjótast at kunna koma í samband við avsendaran ella kontaktpersónarnar
- opið og erligt samskifti
- halt teg til tað ítøkiliga. Lýs, tú tað sært
- handfar trúnaðarligar upplýsingar rætt



Tað eru tvey sløg av yvirskipaðum upplýsingum um aðrar persónar:

- Atburður: Heilt ítøkiliga tað, sum øll kunna síggja. Upplýsingar um barnsins atburð eiga vanliga at verða umrøddar.

- Privat og trúnaðarlig viðurskiftir: Sosial viðurskiftir og trupulleikar, misnýtsla, heilsuviðurskiftir, kynslig viðurskiftir, revsiverd viðurskiftir, átrúnaður, húðarlitur, politisk og felagslig viðurskiftir. Slíkar upplýsingar eiga sum meginregla ikki at verða givnar víðari.
Bert um tær er alneyðugur fyri málið, kunnu tær verða latnar víðari – og helst skulu foreldrini hava góðkent tær.

Góður skikkur í sambandi við at veita upplýsingar um privatu og trúnaðarligu viðurskifti hjá einum persóni

- fáið foreldrini so nógv og so tíðliga uppí sum møguligt
- opið og erligt samskifti
- set teg í familjunnar stað
- veit bert upplýsingar um tað, ið tú verður biðin um
- kunna foreldrini um tað, ið skrivað verður

EFTIRKANNINGARLISTI

Eftirkanningarlisti til „Vit skulu tosa um tað“ – Tann kriminalfyribyrgjandi samrøðan

1. Fyrireikingin av samrøðuni

- Hvat er endamálið við samrøðuni?
- Hvør skal luttaka?
- Um fleiri luttakarar eru, so skulu tit avtala tykkara innanhýsis leiklut, og hvussu til stuðla hvørjum øðrum.
- Hvussu stóran týdning hevur tað, at bæði foreldrini eru við?
- Hvar og hvussu skal samrøðan fremjast?
- Hvar skal samrøðan vera? (karmar)
- Ver varugur við, at øll foreldur eru viðbrekin, tá tað snýr seg um teirra børn.
- Hugsa um, at foreldrini altíð gera sítt besta. Onkuntíð er tað bara ikki nóg mikið.

2. Fáa samband í lag

- Hvussu og hvør fyrireikar og bjóðar foreldrunum til samrøðuna?
- Greið stutt frá grundarlagnum fyri samrøðuni, skrivliga ella munnliga.

3. Samrøðan

- Ger nógv burturúr innleiðingini. Sig blídliga góðan dag – „Takk fyri, at tit kundu koma“, og skapa eitt gott huglag.
- Ger greitt, hvat endamálið við samrøðuni er: Hví eru vit her? Hvat er tað, vit skulu tosa um?
- Sig, hvussu longi samrøðan skal vara (í minsta lagi 30 min og í mesta lagi 1 tíma).
- Byrja samrøðuna við foreldrini við at tosa um tínar eygleiðingar og tína stúran. „Eg havi lagt til merkis…“
- Greið teimum frá tínum ótta við at nevna dømir: Hvat tú hevur eygleitt, nær, hvussu, hvussu nógv …?
- Fá foreldrini sjálvi at tosa um teirra barn. „Hvussu upplivir tú/tit..?“
- Halt fokus. Far ikki í verjustøðu, um foreldrini verða óð ella áleypandi.
- Halt fast í tí, sum tú ert stúrin um.
- Royn ikki at tosa fakmál ella mál, sum er stoytandi ella ikki so lætt at skilja.
- Lat familjuna kenna, at tú hugsar um tey, ver opin, vís teimum viðurkenning, soleiðis sum tú sjálv hevði viljað verið viðfarin í somu støðu – men miss ikki fokus viðvíkjandi trupulleikanum hjá barninum.

4. Atgerð

- Hvat halda foreldrini skal ella kann gerast?
- Hvat heldur tú skal gerast?
- Um neyðugt, kanst tú upplýsa um leiðreglurnar í lóggávuni.
- Ger eina virkisætlan, sum øll kunnu góðtaka.
- Avtala eina tíð til at fylgja málinum upp. Nær kunnu vit tosa saman aftur?

5. Endin á samrøðuni

- Tak samanum. „Vit hava tosað um …“, „Vit hava avtalað…“
- Heldur familjan, at tit hava okkurt eftir at tosa um ella fáa upp á pláss?
- Eru tit samd í, at avtalan er góð?
- Hvussu hava tit upplivað samrøðuna?
- Sig blídliga farvæl. „Takk fyri, at tit kundu koma“. „Um tit hava brúk fyri at tosa, so eru tit vælkomin at ringja…“

6. Afturmelding í fakliga netverkinum

- Hvat gekk væl, og hvat gekk minni væl?
- Fekk eg sagt tað, sum var endamálið?
- Fekk eg sagt tað á ein slíkan hátt, at foreldrini skiltu og kendu myndina, eg/vit góvu av barninum?
- Hvat fortaldu foreldrini okkum um sítt barn?
- Fingu vit skapað eina felags fatan?

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi